Copydan/
AVU-medier

NÁM

# Livandi myndir í undirvísingini

Livandi myndir í undirvísingini. Fá íblástur frá ítøkiligum dømum um nýtslu av sjónvarpssendingum og filmi í undirvísingini við námsfrøðiligum vegleiðingum, sum lærugreinaráðgevar frá CFU hava gjørt.

Miðnámsútbúgvingar



**Royn tvørlærugreina temaundirvísing**

Á mitCFU eru ikki bert livandi myndir til allar lærugreinarnar, men eisini tilfar, sum leggur upp til at royna tvørlærugreina temaundirvísing.



Myndatakari | Ditte Valente

# Nýt sjónvarpssendingar og filmar í undirvísingini við mitCFU

Við mitCFU fært tú, umframt atgongd til filmar og sjónvarp, eisini íblástur til egna undirvísing og fyrireiking úr námsfrøðiligu vegleiðingunum, sum lærugreinaráðgevar hava gjørt, og sum eru til taks har í hópatali, umframt tilvísingar til brot og krosstilvísingar millum sjónvarpssendingar, stuttfilmar, heimildarfilmar og spælifilmar. Harumframt verður mitCFU víðkað og dagført hvønn dag við nýggjum sjónvarpssendingum, heimildarfilmum og spælifilmum. Sendingar verða hvønn dag lagdar inn í mitCFU og verða goymdar í langa tíð, tað vil siga, at har ikki er nakað tíðarmark á sendingini. Við TVIS avtaluni og einum CFU Film og TV haldi hevur tú atgongd til m.a. 50.000 sjónvarpssendingar frá donskum og útlendskum sjónvarpi, stroyming frá Filmcentralen, umframt at tú kanst geva næmingunum talgilt tilfar sum skúlating til næsta tíma gjøgnum stroyming frá mitCFU. Í avtaluni Spillefilmsaftalen fær útbúgvingarstovnurin harafturat atgongd til 700 spælifilmar at nýta í undirvísingini. Her sært tú dømi um tilfar á mitCFU, sum er viðkomandi fyri undirvísingina á miðnámsútbúgvingunum innan fleiri ymisk temu.

## Stroym filmar

Í mitCFU kanst tú sum lærari stroyma filmar og sjónvarpssendingar lætt og lógliga. Í mitCFU eru filmar og sendirøðir í hundraðtali, bæði nýtt og eldri tilfar, og javnan verða nýggir filmar og sendingar løgd inn. Sí niðanfyri, hvussu tú stroymir beinleiðis á mitCFU.

rise.articulate.com

Tema

# / Veðurlag og umhvørvi – trupulleikar og loysnir




Ofta verður einamest tosað um og arbeitt við veðurlags- og umhvørvisvanlukkur, og minni um, hvørjir møguleikar eru at forða fyri, at hendan gongdin heldur fram.

**"Ren teknologi (1-4)"**
/ DR2 2022
Heimildarrøð, sum kannar møguligar loysnir fyri veðurlagskreppuna. Hvør sending er 16-17 minuttir.
→ mitcfu.dk/TV0000128528

**"Den grønne optur (1-4)"**
/ DR1 2022
Heimildarrøð, sum viðger ítøliligar umhvørvistrupulleikar, t.d. klædna- og matframleiðslu, CO2 dálking og orkuframleiðslu, og kannar møguligar loysnir.
→ mitcfu.dk/TV0000128715

**"Hvorfor plastik (1-2)"**
/ DR1 2021
Fyrra sendingin kannar avleiðingarnar, sum plast kann hava á heilsuna hjá menniskjum. Tann seinna sendingin kannar endurnýtsluídnaðin av plasti og hugtakið "greenwashing".
→ mitcfu.dk/TV0000125894

**"Til sidste dråbe"**
/ Tysk film ARD 2022
Hesin filmur ger umhvørvis- og veðurlagstrupulleikarnar ítøkiligar við at taka støði í tí mest grundleggjandi fyri øllum livandi – vatni og vatnveiting.
→ mitcfu.dk/TV0000127403

**"Plasthavet"**
/ NRK1 2021
Alt ov nógv plast er í havinum og við strendurnar. Í hesari sendirøðini greiða granskarar frá, hvør avleiðingin av hesari dálkingini er fyri okkum, fyri djórini og fyri náttúruna.
→ mitcfu.dk/TV0000126154

**"Greta"**
/ DR2 2021
Fyri milliónir av fólki er hon ein íblástur við sínum áhaldandi stríði fyri umhvørvið. Greta Thunberg – ein svenskur fólkaskúlanæmingur, sum gjørdist heimskend aftaná, at hon einsamøll fór í umhvørvisverkfall.
→ mitcfu.dk/TV0000122959

**"Varme takket være hamp og hightech"**
/ ZDF 2021
Lívrunnin brennievni eru stóru syndararnir, tá tað kemur til umhvørvið. Kortini verða flestu heimini og almennu bygningarnir hitað við hesum. Men har eru aðrir møguleikar.
→ mitcfu.dk/TV0000123863

**"Farvel til plastik"**
/ ZDF 2021
Ein ørgrynna av plasti verður koyrd burtur hvønn dag, og í Týsklandi verður bert 20% av plastinum endurnýtt. Tveir triðingar verða brendir og restin verður útflutt. Tað ber til at bøta um hesa støðu.
→ mitcfu.dk/TV0000124016

**"Med naturens kraft"**
/ ZDF 2021
Vit oyðileggja okkara egnu jørð, tí vit brúka meira enn jørðin megnar at geva okkum. Tó eru aðrir møguleikar. Tíbetur hugsa nøkur øðrvísi og vinna burðardyggar loysnir.
→ mitcfu.dk/TV0000123458

Tema

# / Søgan og søguliga tilvitið



Stockholms blodbad

Vit læra av søguni um, hvørji vit eru, hvaðani vit eru, og hví vit eru soleiðis sum vit eru. Her er eitt tyssi av áhugaverdum sendingum um bæði ta nýggjaru og tað eldru søguna.

**”Stockholms blodbad – kampen om tronen (1-2)”**
/ SVT1 2020
Í 1520 var valdsstríð um trónuna í svenska høvuðsstaðnum. Hetta verður rópt Stockholms blodbad. Liðin eru nú 500 ár, og tíðin sostatt búgvin at kanna, hvat veruliga hendi á Store Torv køldu novemburdagarnar
í 1520.

→ mitcfu.dk/TV0000122789

**”Liv i renæssancen (1-6)”**
/ DR2 2009
Hugvísindin og áhugin fyri at kanna náttúruna, sum kom úr endurburðartíðini, kemur til Danmarkar úr Italiu í 1500 talinum. Hendan sendirøðin lýsir hetta søguliga tíðarskeiðið við støði í týdningarmiklum persónum.

→ mitcfu.dk/TV0000125716

**”Danmarkshistorien på vrangen (1-6)”**
/ DR2 2020
Sjónvarpsheimildarsendirøðin lýsir tematiskt partar av søgu Danmarkar, sum ikki hava fingið so stóran part í søgubókunum. Hvør sending hevur eitt tema: harðskapur, sex, trælahald, sjúka og deyði.

→ mitcfu.dk/TV0000119335

**”Nürnbergprocessen: Nazisterne for retten”**
/ DR2 2021
Aftaná seinna veraldarbardaga vórðu 21 týdningarmiklir nazistar drignir fyri rættin fyri tær brotsgerðir, sum høvdu við sær, at fleiri milliónir lótu lív. Rættargongdin verður lýst gjøgnum uppruna films- og ljóðupptøkur, umframt at eitt beinleiðis vitni greiðir frá gongdini. Ávarað verður um ógvusligar myndir.

→ mitcfu.dk/TV0000125545

**”Massakren i Tulsa 1921”**
/ DR2 2022
Í 1921 verður satt rok í Tulsa, Oklahoma. Ein bólkur av uppøstum hvítum fólki oyðiløgdu og brendu allan Greenwood býarpartin. Eingin blandaði seg uppí, meðan býarparturin varð oyðilagdur, og omanfyri 300 myrk fólk vórðu dripin.

→ mitcfu.dk/TV0000127666

**”I am not your negro”**
/ DR2 2018
Tilfarið til heilmildarfilmin er 30 síður av notum hjá James Baldwin til verkætlanina “Remember This House”, sum ongantíð gjørdist liðug. James Baldwin letur ongantíð rasismu, kúgan og vantandi borgararættindi gerast til ein spurning um hatur og óndskap, tí slíkir trupulleikar eru nógv meiri fløktir enn so.

→ mitcfu.dk/TV0000111964

**”Black Power – historien om modstand”**
/ DR2 2022
Hesin heimildarfilmurin lýsir Black Power rørsluna í Onglandi. Heimildarfilmurin hevur eina røð av myndum frá 1960- og 1970unum, fleiri samrøður, sum fyri kortum eru gjørdar við fólk, sum á onkran hátt høvdu samband við rørsluna, umframt samrøður við politistar, sum tá vóru uppi í málinum.

→ mitcfu.dk/TV0000127081

**”Thatcher og Reagan – et særligt venskab (1-2)”**
/ DR2 2022
Hesin heimildarfilmurin lýsir, hvussu tað bar til og hví sjónleikarin og ‘The Iron Lady’ gjørdust góðir vinir, og ikki minst, hvønn týdning teirra vinalag fekk í sambandi við kalda kríggið.

→ mitcfu.dk/TV0000129083

Tema

# / Kyn og seksualitetur, ungdómur og samleiki




Máttmikil fiktión og upplýsandi miðling um kærleika, um tað at skapa sær ein samleika og um seksualitet.

**"Et helt menneske (1-5)"**
/ DR1 2022
5 ára gamla Asta er født sum ein drongur, men kennir seg sum genta. Frederik er 17 ára gamal, tá hann tekur støðu til, at hann vil liva lív sítt sum genta. DR hevur í fleiri ár fylgt tveimum familjum, sum hava eitt barn, sum er tvørkynt.
→ mitcfu.dk/TV0000128161

**"Becoming Andi"**
/ BBC World 2021
Amerikanski tannáringurin, Andi Bernabe, sum er tvørkyndur, hevur í eitt ár tikið upp lív sítt í Texas á video, har hann greiðir frá bæði góðum og truplum hendingum.
→ mitcfu.dk/TV0000124398

**"Skál"**
/ Føroyskur heimildarfilmur, 2021 DR3 2022
Er tað synd at drekka, tá mann er kristin? Er tað synd at hava sjeik, sum ikki er kristin? Dania O. Tausen er 21 ára gomul og er uppald í einari kristnari samkomu í Føroyum, men er júst flutt til Havnar.
→ mitcfu.dk/TV0000127098

**"Dreymar við havið"**
/ Spælifilmur, Føroyar 2017
Almenniskjalig menningarsøga um at gerast vaksin, at blíva forelskað/-ur, at hava dreymar um eitt heilt øðrvísi lív og at finna seg sjálva/-n. Filmurin hevur enskan tekst.
→ mitcfu.dk/TV0000127135

**"En helt almindelig familie"**
/ Spælifilmur, Danmark 2020
Thomas, Helle, Emma og Caroline eru ein púra vanlig familja. Men tá pápin fortelur familju sínari, at hann er tvørkyndur, broytist alt. Námsfrøðilig vegleiðing við herðslu á autofiksjón, kynssamleika og menningarsøgu.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1114399

**"Lille pige"**
/ Spælifilmur, Frankaríki 2020
7 ára gamla Sasha er fødd sum drongur, men hevur altíð vitað, at hon er ein genta. Foreldur hennara stríðast áhaldandi fyri at greiða frá avbjóðingunum, sum Sasha hevur, og at fáa onnur at viðurkenna tær.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1125733

**"Alltid Amber"**
/ STV2 2021
Amber er í holt við seinasta árið á studentaskúla, og henni dámar best at vera saman við barndómsvini sínum, Sebastian. Tey eru bæði ung og samkynd. Tá tey eru saman, flýggja tey frá trongskygni og døming frá umheiminum. Allir møguleikar kennast opnir.
→ mitcfu.dk/TV0000122905

**"Under regnbuen (1-4)"**
/ TV2 2021
Hvat er tað at vera lgbt+ ari í Danmark? Peter Frödin leiðir okkum gjøgnum 120 ár gomlu lgbt+ søguna og tess stríð um javnrættindi gjøgnum søguna.
→ mitcfu.dk/TV0000124954

**"Pride (1-6)"**
/ DR2 2021
Amerikonsk heimildarsendirøð um stríðið fyri LGBTQ+ rættindum í USA, sum hevur verið merkt av stórum broytingum, ið eisini hava havt ávirkan á rørsluna.
→ mitcfu.dk/TV0000125032

Tema

# / Fiksjón og filmsgerð – frá bók til film


Undtagelsen

Tað er blivið alt meira vanligt, at skaldsøgur gerast til film. Hvat fer fram, tá ein skaldsøga verður flutt yvir í film? Hava filmsframleiðararnir somu listaligu hugsjón? Er filmurin, sum er bygdur á skaldsøguna, at skilja sum eitt nýtt sjálvstøðugt tekstslag?

**"Undtagelsen"**
/ 2021
Flestu okkara munnu halda, at eitt menniskja, sum gerst ónt, má sjálvt hava verið fyri óndskapi. Hesin sálarfrøðiligi ræðufilmurin rannsakar óndskap sálarfrøðiliga og hvat tað er, sum trýstir fólk til happing, hevnd og at enda morð.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123796

**"Lykke-Per"**
/ 2018
Ungi verkfrøðingurin, Per Sidenius, hevur nógvar verkætlanir í høvdinum, og tá hann hittir ríku Salomon familjuna, tykist tað sum bønarsvar uppá allar hansara bønir.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1111020

**"Du forsvinder"**
/ 2017
Frederik er leiðari á einum privatskúla og giftur Miu. Ein dagin verður Frederik ákærdur fyri at havt fram fíggjarundandrátt, og gerst hetta eitt bakkast fyri skúlan.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1072545

**"Nordkraft"**
/ 2005/2019
Ein lýsing ígjøgnum fleiri lagnur av rúsevnisumhvørvinum í Aalborg í fyrru helvt av hálvfemsunum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1106262

**"Det forsømte forår"**
/ 1993/2017
Næmingar frá Metropolitanskúlanum hava 25 ára hátíðarhald og minnast í felag góðar, gamlar dagar. Fyri flestu teirra var talan um skúlagongd, sum var alt annað enn góð.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1071772

**"Kunsten at græde i kor"**
/ 2007/2021
Henry Johannesen nýtir hvørt høvi at gremja seg um sítt syndarliga lív. Hvørja ferð hóttir hann við at gera sjálvmorð. Av hesi orsøk syrgir 11 ára gamli sonur hansara, Allan, fyri, at onkur altíð er hjá pápanum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1122919

**"Homo Faber (Voyager)"**
/ Spælifilmur, Týskland/Frankaríki 1992
Ein maskinverkfrøðingur í Sveis verður á einari ferð forelskaður í einari 20 ára gamlari gentu, uttan at hann veit, at hetta er dóttir hansara. Tá hann skilir, hvussu alt hongur saman, gerst hansara gløggi og tøkniliga rættaði heili noyddur at góðtaka lívsins loyndarfullu og kenslubornu tættir.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1125770

**"Pelle Erobreren"**
/ 1987/2017
Snýr seg um fæloysingin, Pelle, og pápa hansara, Lasse, sum 1. mai 1877 koma til Bornholm, har teir byrja uppá ein strævið lív sum arbeiðarar á Stengården.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1070717

**"Hærværk"**
/ 1977/2018
Er um miseydnaða yrkjaran, Ole Jastrau, sum í Keypmannahavn í tíðini millum bæði heimskríggini uppiheldur sær við at ummæla list í Dagbladet. Hansara egni íblástur er horvin, og kenslan av tómleika og vónbrot tekur yvir.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1072038

Tema

# / Fagri nýggi heimur – náttúruvísindi í 21. øld

Rúgvan av náttúruvísindaligum fundum og framburði er ikki til at fata. Menniskjaættin megnar ferð eftir ferð at bróta mørk og finna nýggjar møguleikar og loysnir, men er tað nú altíð til gagns fyri okkum?

**"Historien om mennesket - med Rane Willerslev (1-4)"**
/ DR2 2020
Fyri seks milliónum árum síðani fekk ein apa tveir ungar. Annar gjørdist til eina sjimpansu, og hin til eitt menniskja, homo sapiens. Rane Willerslev lýsir undranarverdu menningarlæruna um, hvussu menniskja gjørdist menniskja.
→ mitcfu.dk/TV0000122753

**"Vores gener – historien bag videnskaben (1-4)"**
/ DR2 2020
Ein søgulig lýsing av arvaeindini frá teirri fyrstu undran um, hví onkrar ertrar eru rukkutar, meðan aðrar ikki eru, til at granskarar kunnu broyta okkara ílegguhóp.
→ mitcfu.dk/TV0000121096

**"Dolly – historien om det klonede får"**
/ DR2 2022
Í 1997 avdúkaðu nakrir granskarar, at seyðurin Dolly var klonað. Heimildarsendingin lýsir søguna um Dolly og um vísindafólkini handan skapanina av Dolly, umframt slóðbrótandi tøknina handan skapanina.
→ mitcfu.dk/CFUTV1130533

**"På rumrejse til solen"**
/ DR3 2019
Í 2018 er eitt rúmdarfar á veg móti sólini, men hvørjar avbjóðingar skuldu loysast, áðrenn hendan rúmdarverkætlanin gjørdist veruleiki, og hvørjar avbjóðingar skuldu loysast á ferðini?
→ mitcfu.dk/TV0000118214

**"Rejsen til isens indre"**
/ TV2 2022
Innlandsísurin í Grønlandi bráðnar, tað er ein sannroynd, men vita vit, hvussu skjótt hann bráðnar? Nei! Vit fylgja trimum granskarar, sum við støði í hvør sínum granskingarøki gera eina roynd at finna útav, hvussu skjótt ísurin bráðnar, ella í øllum førum at koma at skilja, hví so nógv óvissa er um spurningin.
→ mitcfu.dk/TV0000127748

**"De moderne materialers magiske verden"**
/ DR2 2020
Sendingin Videnskabsmagasinet kannar og lýsir ta nýggjastu og slóðbrótandi uppfinning innan tilfar til at nýta í ídnaði. Her hitta vit uppfinnarar, sum framleiða byggitilfar úr soppum, klæði úr ananasleðri og tráð, sum er átta ferðir sterkari enn bummulstráður osv.
→ mitcfu.dk/TV0000120453







**"Radioactive"**
/ Spælifilmur, UK 2019

Ein spælifilmur um nobelprísvinnaran, Marie Curie, og lívslanga stríð hennara fyri – ikki bara at finna frumevnini polonium og radium, men eisini fyri at vinna sær sámuliga viðurkenning í vísindaheiminum.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1123797

**"Clara Immerwahr"**
/ Spælifilmur, ARD 2014

Ein spælifilmur um Clara Immerwahr, sum er evnafrøðingur og sannført friðarhugsjónarfólk ella pasifist, sum vit eisini siga. Á fróðskaparsetrinum hittir hon evnafrøðingin, Fritz Haber, sum hon giftist við. Felags hugsjón teirra um at nýta granskingina fyri at arbeiða fyri einum betri heimi, verður av Fritz oyðiløgd, tá hann brúkar sína gransking til at framleiða eiturgassið, sum skal nýtast ímóti sameindu herfólkunum í stríðnum í Ypern í 1915 undir fyrra veraldarbardaga.

→ mitcfu.dk/TV0000029705



# Spælifilmur til tíðina og lærugreinina

Á mitCFU kanst tú stroyma 700 føroyskar og útlendskar spælifilmar, sum lærugreinaráðgevar hava valt og viðgjørt.

Til nógvar av filmunum er námsfrøðilig vegleiðing og/ella tilvísingar til brot og í fleiri førum eisini leinki til eyka sjónvarpssendingar, uttanhýsis undirvísingartilfar ella annað viðkomandi tilfar. Fremmandamálsundirvísingin fær fleiri møguleikar við hesum, tí her ber til at velja at hava, ella ikki at hava, filmarnar tekstaðar. Eisini kann mann deila filmarnar við næmingarn ar, so tey sjálv kunnu stroyma filmarnar gjøgnum sína egnu teldu ella teldil sum part av eitt nú bólkaarbeiði ella skúlatingum.

## / Føroyskt

**“Barbara”**
/ 1997
Tá sorinskrivarin sigur nýggja danska prestinum, at ein einkja er á kallinum, er prestur ikki hugaður at gifta seg við henni, sum vanligt var tá í tíðini. Men tá hevur hann enn ikki sæð Barbaru.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1071278

**”Bye Bye Blue Bird”**
/ 1999
”Roadmovie”, ið fylgir teimum báðum Rannvá og Barbu, tá tær venda aftur til Føroya eftir at hava búð uttanlands í fleiri ár.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1076367

**”Nina”**
/ 2018
Nina er ungur rithøvundur, sum flytir saman við sjeiki sínum, Williami, úr Danmark til Føroya út á eina lítla oyggj. Í byrjanini tykist alt so hugfarsligt í friðarliga umhvørvinum, har hon hevur ætlað at hjúkla um seg sjálva og barnið, hon ber undir brósti, og skriva fyrstu skaldsøgu sína, meðan William arbeiðir sum lækni í Klaksvík. Tó gerst hennara uppliving av friðinum, hon leitaði eftir, skjótt til eina uppliving av at vera fangað.
→ mitcfu.dk/TV0000127122

**”Dreymar við havið”**
/ 2017
Almenniskjalig menningarsøga um at gerast vaksin, at blíva forelskað/-ur, at hava dreymar um eitt heilt øðrvísi lív og at finna seg sjálva/-n.
→ mitcfu.dk/TV0000127135

**”Heartstone”**
/ 2016
Íslendskur spælifilmur frá 2016. Tannáringarnir Thor og Kristján eru vinmenn og búgva í eini lítlari bygd í Íslandi. Tað er summar, og teir eru á veg í vaksnamannaheimin og hava stóran áhuga fyri kynslívi og kynsbúning. Thor dámar væl Beth, og Kristján finnur útav, at hann er samkyndur.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1076465


Dreymar við havið

# / Danskt

**“Pagten”**
/ 2021

“Hvis du har mistet troen på Gud, da tro på mig, og jeg vil dig beskytte.” Tá ungi yrkjarin, Thorkild Bjørnvig, og væl til aldurs komna Karen Blixen hittast, broytist lívið hjá teimum báðum við einum óslítandi sáttmála um trúskap.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1126787

**“Rose”**
/ 2022

Seint á sumri koma Ellen og maður hennara, Vagn, til ein stovn í Norðurjyllandi eftir systur Ellen, sum er sálarsjúk. Saman ætla tey sær á eina mentanarferð til París saman við einum fullum bussi við spentum norðurjydum.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1125732

**“Pusher”**
/ 2004

Ein narkoseljari á Vesturbrúgv í Keypmannahavn kemur í óføri, tá tað gongur galið við søluni. Og nú er tilvera hansara, sum annars var so góð og løtt, broytt til ein brutalan kamp fyri at yvirliva.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1072495

**“Druk”**
/ 2020

4 studentaskúlalærarar – allir menn – fara í holt við eina kanning um, hvussu tað man vera at vera eitt sindur ávirkaður hvønn dag?

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117212



Psykos i Stockholm




Rose

**“Psykos i Stockholm”**
/ Svøríki 2021

Móðir og dóttir eru á veg til Stokkhólms at hugna sær saman í sambandi við 14 ára føðingardagin hjá dót trini, men longu í tokinum byrjar atburðurin hjá mammuni at gerast løgin. Dóttirin er bangin fyri, at mamman aftur fer at fáa eina psykosu. Hóast hesi tekin, so royna tær at hugna sær á túrinum sum best.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117214



# / Enskt

**“Little Women”**
/ 2019

Fjálga søgan hjá Louisa May Alcott, her sum spælifilmur, lýsir søguna hjá 4 sera ymiskum systrum, sum mitt í 1800 talinum stríðast við kærleika, sambandið við hvørja aðra og stóra tørv teirra at liva eitt sjálvstøðugt og frælst lív.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1127977

**“Elvis”**
/ 2022

Ævisøguligi spælifilmurin snýr seg um tónleikaran Elvis Presley og tey fyrstu árini í hansara tónleikalívi. Filmurin leggur upp til kjak um treytirnar og mekanismurnar í popptónleikinum tey seinastu 30 árini í USA.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1127943

**”Hundredefodsrejsen”**
/ 2021

Familjumatstovan í Mumbai verður stongd, tá Kadam familjan er noydd at flyta undan ófriði í býnum. Tey fara til Evropa og av tilvild koma tey til ein suðurfranskan bý. Tá tey her lata eina indiska matstovu upp, verður opið stríð við frú Mallory, sum eigur og rekur Michelin matstovuna yvirav.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1124139

**“Minding the Gap”**
/ 2018

Heimildarfilmur um tríggjar dreingir, sum eru um at gerast vaksnir. Bing, Zack og Keire eru vinir og búgva í Rockford í Illinois, sum er ein býur merktur av stórum arbeiðsloysi og brotsverki. Allir eru teir uppvaksnir í ótryggum heimi og fáa tíðina at ganga við at standa á rennifjøl og ballast. Filmurin er tikin upp av Bing yvir fleiri ár.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117872

**“Dating Amber”**
/ 2020

Tveir tannáringar, sum eru vinir og sum eisini bæði eru samkynd, gera av at spæla, at tey eru par fyri at steðga øllum illgruna um teirra seksualitet.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117425

**“Falling”**
/ 2020

Tá Willis, sum er 80 ára gamal bóndi, fer til Los Angeles at vitja son sín John og familju hansara í eina tíð, bresta tveir sera ymiskir heimar saman.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117211

# / Týskt

**“Borgmesteren”**
/ 2022
Tað gerst ein avbjóðing fyri borgmeistaran, Claudia Voss, tá fylkið ger av at seta á stovn eitt heim til flóttafólk í tí annars friðarliga býnum Neustadt-Linden.
→ mitcfu.dk/TV0000129449

**“Honecker und der Pastor”**
/ 2022
Uwe Holmer er prestur og borgmeistari í lítla býnum Lobetal. Lívið saman við familjuni er friðarligt og róligt. Hetta broytist tó, tá falni Erich Honecker og konan, Margot, søkja sær friðskjól hjá prestinum.
→ mitcfu.dk/TV0000127406

**”Camper 303”**
/ 2018
Ein ung kvinna á veg til sjeikin fyri at fortelja honum, at hon er við barn. Ein ungur maður, sum vil finna biologiska pápa sín. Saman fara tey á eina ferð gjøgnum Evropa í einum gomlum húsbili, og eymar kenslur fara at spíra.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123101

**“Revolutionens ulidelige lethed”**
/ 2021
19 ára gamla Franka verður ald upp av foreldrum, sum eru sera trúgv móti samfelagsskipanini í Leipzig, Eysturtýsklandi. Ein dagin hittir hon nøkur ung, sum mótmæla dálking og náttúruoyðing, og hon verður drigin at teirra lívsstíli.
→ mitcfu.dk/TV0000124211

# / Franskt/spanskt

**“Duften af roser”**
/ 2021
Eva plagdi at klára seg væl sum rósualari, men nú er hennara garður, hetta lívsverk hennara hótt við húsagangi. Hendan støðan broytist tó, tá trý sera ymisk fólk koma í starvsvenjing hjá Evu.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1126879

**“Comme un lion”**
/ 2013
15 ára gamli Mitri býr í einari senegalskari bygd. Eins og aðrir javnaldrar sparkar hann bólt og droymir um Barça og Chelsea. Tá eitt umboð fyri eitt fótbóltsfelag tekur hann við sær til Evropa, heldur Mitri, at nú gerst dreymurin til veruleika.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1126292

**“Proxima”**
/ 2020
Søgan um móður og dóttur í einum rúmdarumhvørvi, sum lýsir torføra valið millum at fylgja sínum rúmdardreymum, ella at røkja sínar familjuskyldur, er viðkomandi fyri øll við áhuga fyri tvístøðum hjá kvinnum
og rúmdarferðum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1117874

**“Sommeren 1993”**
/ 2017
Pápi Fridu er deyður, og mamman doyr, tá Frida er 6 ára gomul. Nú skal Frida búgva hjá mammubeiggja sínum og hansara familju. Sjálvt um tey øll eru góð við Fridu og eru ein fjálg og góð familja, eru sorgin og einsemið Fridu sera nívandi og tyngjandi.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123083

# / Søga/ samfelagsfrøði



Rafiki

**"Rafiki"**
/ 2018
Kena og Ziki eru tvær ungar kvinnur úr Kenja, sum gerast drignar at hvørjari aðrari og loyniliga gerast par. Pápar teirra eru politiskir andstøðingar og samfelagið er alt annað enn tolsamt móti samkyndum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1117486

**"Margrete den Første"**
/ 2022
Danskur stórfilmur um Margretu drotning ta fyrstu, sum er ein av teimum, sum Danmarkarsøgan hevur varnast minst. Mitt í einum stórpolitiskum talvi kemur hon í eina ógvusliga tvístøðu, tá ein maður traðkar fram og sigur seg vera hennara fyrstafødda barn, sum annars var hildin at vera deyður.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1126788

**"Stalingrad"**
/ 1993
Týskur stórfilmur um "Stríðið um Stalingrad" undir seinna heimsbardaga frá teimum fyrstu sigrunum til endaliga tapið, sum verður fortaldur úr sjónarhorninum hjá 6 týskum hermonnum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1122862

**"Die Wannseekonferenz"**
/ 2022
Leiðandi umboð fyri nasistiska stýrið hittust í einari villa í Berlin-Wannsee tann 20. januar 1942 til fundar. Ein fundur, sum í søgubókunum verður róptur Wannsee-fundurin.
→ mitcfu.dk/TV0000126828

**"Judas and the Black Messiah"**
/ 2020
FBI ger av at síkja seg inn í bólkin, Black Panther Party, tá borgararættindarørslan av álvara tekur dik á seg. Endamálið er at seta karismatiska leiðaran, Fred Hampton, út úr spælinum.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123839

**"Den største forbrydelse – historien om holocaust i Norge"**
/ 2020
Eftir boðum frá týska hersetingarvaldinum verður ein stór løgregluatsókn sett í verk um alt landið tann 26. november 1942.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123800

**"The World to Come"**
/ 2020
Eftir at dóttirin er deyð, gera hjúnini Abigail og Dyer av at gerast bøndur og búseta seg langt burtur frá øllum í Schoharie. Men lívið hjá Abigail broytist, tá hon fær eitt blómandi samband við grannakonuna.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1123904

**"Før frosten"**
/ 2018
Livikorini á landinum í 19. øld vóru sera trong, og fyri framman bíðar aftur ein kaldur og harður vetur fyri Jens, bónda. Fyri at koma ígjøgnum veturin og tryggja familju sínari eitt betri lív, ger Jens eina avtalu við stórbóndan, sum eigur grannagarðin.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1115965

**"Copilot"**
/ 2021
Tað er kærleiki fyri fyrsta eygnakast, tá Alsi sum blaðung hittir Saeed mitt í 90unum. Tá 21. øld nærkast, tekur Saeed eina avgerð, sum ikki bert fer at leggja allar dreymar hjá Alsi um eina felags framtíð saman við Saeed í oyði, men sum eisini fer at broyta allan heimin.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1122861

**"438 dage"**
/ 2021
Martin Schibbye og Johan Persson, sum báðir eru journalistar, satsa alt, tá teir á sumari 2011 fara yvir um markið millum Somalia og Etiopia saman.
→ mitcfu.dk/TV0000124613

# Tíðarbæri og skrá við sjónvarps-sendingum í túsundatali

Á mitCFU ber eisini til at velja ímillum fleiri túsund føroyskar og útlendskar sjónvarpssendingar og heimildarfilmar at stroyma. Evnini, hesar sendingar viðgera, eru bæði tíðarleys og sera tíðarbær – og tí eisini væl egnað til nýtslu í undirvísingini.

Úrvalið er sera breitt, og savnið við sjónvarpssendingum økist dagliga við millum 10-15 sendingum.

## / Hugvísindaligar lærugreinar

**“Paul, Apostle of Christ”**
/ 2018

Paul, Apostle of Christ snýr seg um tveir mans. Lukas satsar alt, tá hann sum vinur og lækni er á ferð til Rom at vitja Paulus, sum er tikin til fanga og er læstur inni í myrkasta fangatippinum hjá Nero.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1119967

**”Dansk teater 300 år (1-10)”**
/ DR2 2022

Donsk heimildarsending í 10 pørtum um donsku sjónleikssøguna, sum byrjaði við Holbert og lítla sjónleikahúsinum í Lille Grønnegade, hin 23. september 1722.

→ mitcfu.dk/TV0000128948

**“Årstidens bøger med Anne-Marie Mai”**
/ DK4 2022

Hetta er ein sjónvarpssending, sum verður send fýra ferðir árliga – ein partur hvønn ársfjórðing. Í sendingunum tekur Anne Marie Mai, bókmentaprofessari, fram, viðmerkir og viðmælir fleiri bøkur, serliga fagurfrøðiligar bøkur, sum eisini fevna um bøkur til børn og ung.

→ mitcfu.dk/TV0000128573

**“Mig og 68’erne (1-2)”**
/ DR2 2022

Danskur heimildarsending í tveimum pørtum. Ungdómsuppreisturin í 1968 vendi bæði Danmark og øllum heiminum á høvdið, og ungu fólkini broyttu vanligu áskoðanina hjá dønum um sex, tónleik, rúsevni, politikk, kyn og móta.

→ mitcfu.dk/TV0000126709

**”Da romantikken rystede vores verden (1-3)”**
/ DR2 2022

Ensk heimildarsending í trimum pørtum. Listin úr romantikkinum ljóðar eisini í okkara tíð. Tá vórðu tey tendrað av vreiði og kravi um frælsi og rættvísi, júst sum listafólk í okkara tíð, eitt nú Banksy og hiphop sangarin Testament.

→ mitcfu.dk/TV0000126560






# / Samfelags- vísindaligar lærugreinar




**"Mariupol – vi overlevede Putins bomber. Stemmer fra krigen"**
/ TV2 2022
BBC heimildarsendingin er samansett av filmum, sum ukrainar hava tikið upp við fartelefonini, og av samrøðum við fólk, sum komu undan við lívinum, tá russar lupu á Mariupol.
→ mitcfu.dk/TV0000129591

**"Human Flow"**
/ 2017
Heimildarfilmurin, 'Human Flow', sum listamanninum og atgerðarmanninum, Ai Weiwei, snýr seg um alheims flóttafólkakreppu, har upptøkur eru gjørdar frá 22 ymiskum londum ígjøgnum eitt ár.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1125728

**"Konspirationskulten QAnon"**
/ DR2 2022
Tey hava einki álit á myndugleikar og FBI metir tey at vera yvirgangsfólk. Í hesari sendingini fer leikstjórin, Ben Zand, og kannar QAnon. Hvørji eru QAnon viðhaldsfólkini? Hví eru tey so víðgongd?
→ mitcfu.dk/TV0000129447

**"Fodboldens grådige bagmænd"**
/ DR1 2022
Í apríl 2021 gjørdu 12 av máttmiklastu fóltbóltsfeløgunum av at seta á stovn eina nýggja evropeiska fótbóltskapping. Hendan kappingin var snikkað soleiðis, at hon tryggjaði fótbóltsfeløgini fíggjarliga í 23 ár. Hetta helt tó bert í 48 tímar.
→ mitcfu.dk/TV0000128273




**"Slavernes glemte historie (1-4)"**
/ DR2 2022
Omanfyri 12 miljónir afrikanarar vórðu sigldir úr Afrika til Norður- og Suðuramerika og Karibia við tí fyri eyga at tryggja, at heimsins største pengamaskina varð hildin í gongd. Fleiri enn tvær miljónir doyðu á ferðini yvir um hav.
→ mitcfu.dk/TV0000126902

**"Mysteriet om Bayeux-tapetet"**
/ DR2 2022
Ein stórlig frásøgn um, tá Vilhelm the Conqueror gjørdi innrás í Onglandi í 1066 við stríðsmyndum, djórum og skipum. Bayeux-veggjaprýðið er ein gáta, men sigur tað yvirhøvur satt?
→ itcfu.dk/TV0000126904

# / Náttúruvísindaligar lærugreinar

**“Tourettemysteriet”**
/ TV2 2022

Talið á tannáringum í Onglandi, sum brádliga fáa ógvuslig hábrøgd ella Tourettes syndrom er vaksandi. Hví er tað so? Kunnu alheimsfarsóttin og sosialu miðlarnir hava nakað við hetta at gera?

→ mitcfu.dk/TV0000129632

**“På skuldrene af Bohr (1-6)”**
/ DR2 2022

Donsk vísindalig sendirøð um gátuføru skamtaalisfrøðina, við støði í teimum hugskotum og hugsanum, sum danski alisfrøðingurin, Niels Bohr, hevði fyri 100 árum síðani, og sum gjørdust grundalagið til skamtatøli. Hvør sending er í 15-20 minuttir.

→ mitcfu.dk/TV0000129599

**“Sådan lever du evigt”**
/ DR2 2022

Kunnu vit liva í allar ævir? Skjótt kann svarið gerast ‘ja’, tí ein læknavísindalig kollvelting er í gongd.

→ mitcfu.dk/TV0000129460

**“Vores mystiske planet”**
/ DR2 2022

Náttúrusending í 5 pørtum.

→ mitcfu.dk/TV0000129227

**“Science’s Greatest Mysteries. Why Do We Exist?”**
/ BBC Earth 2022

Ensk heimildarsending. Sendingin hevur sum endamál at kanna, hví vit eru til.

→ mitcfu.dk/TV0000129118






## Orðafrágreiðingar til gullið, sum tú finnur í mitCFU

- Ein námsfrøðilig vegleiðing er undirvísingartilfar, sum lærugreinaráðgevi við frálærugreinafrøði í huga hevur gjørt til lærutilfar og sum er ætlað at geva undirvísarum hugskot til, hvussu lærutilfarið kann nýtast í undirvísingini og, hvussu hetta kann knýtast til annað lærutilfar/setast í frásjón.
- Ein viðmerking er ein stutt lýsing av, hvussu lærutilfarið kann nýtast í undirvísingini saman við evnisorðum og lærugreinum.
- Ein viðmerking til brot er ein viðgerð av spælifilmi ella sjónvarpssending, sum lærugreinaráðgevi hevur gjørt, og sum eisini kann hava uppgávur til næmingar.
- NOTA er ein funka til at fáa tekstin lisnan upp.



**Hjálp hjá næmingum í sambandi við stórar skrivligar verkætlanir**

Tá næmingarnir skulu skriva tær stóru verkætlanirnar, kanst tú leita teimum viðkomandi tilfar fram á mitCFU. Gev eisini gætur, at tú sum lærari kanst bíleggja sjónvarpstilfar til næmingarnar, soleiðis at teir sjálvir sleppa fram at tí. Ráðgevar eru til taks at hjálpa við at finna viðkomandi filmar og sendingar fram, sum kunnu verða brúktar í sambandi við uppgávur og verkætlanir.





Den største forbrydelse


Judas and the black Messiah

Copydan/
AVU-medier

cfu centre for undervisningsmidler

NÁM

# Fleiri temu og lærugreinar eru á mitcfu.fo

Mitcfu.fo hevur eisini eina ørgrynnu av sjónvarpssendingum og spælifilmum við námsfrøðiligari vegleiðing. So at siga allar lærugreinar á gymnasialum miðnámi eru umboðaðar. Bæði tú og næmingar tínir kunnu stroyma tilfarið. Mitcfu.dk

mitCFU.fo

# Ein heimur við livandi læring

Copydan AVU-medier er atgongd tín til ein heim við livandi læring. Vit eru ein almannagagnligur felagsskapur, sum virkar uttan vinning fyri eyga. Eigararnir av felagsskapinum eru 20 rættindafelagsskapir frá mentanarvinnuni í Danmark. Skúlar og útbúgvingarstovnar í danska kongaríkinum sleppa gjøgnum Copydan AVU-medier framat einari ørgrynnu av sjónvarpssendingum og spælifilmum, sum kunnu nýtast í undirvísingini og í undirvísingargongdum.

copydan-avumedier.dk